# *Bátsbandið*

## Bátshaldsskipan føroyinga fyri 1865 og rættarstøði hennara

*Andras Mortensen*


### Úrtak

'Bátsbandið' is the common word for the old (unwritten) Faroese customary law system of keeping large fishing boats for winter fishing. Within this system certain boatowners had at any time at their disposal the requisite number of men for their boats. In return the crew had certain rights opposite the boatowner. After the introduction of the first Danish constitution in 1849, and when later the Faroe Islands got free trade, the system came into conflict with the spirit of the time, and in 1865 it was abolished by law. In the article the legitimacy of the system is examined. The source material points out that the origin of the system was connected with the landed property of the original farms, which in the course of time had been divided into 'býlingar', i.e. groups of houses built on the building ground of the original farms, and thus we deal with a relict of the oldest customary law system of the Faroe Islands. In some villages the original boat keeping system remained until the day of abolition. In other places it was gradually adapted to the ideology of the Danish absolute monarchy 1660-1849, whose representatives dominated the Faroese administration of justice.


### Inngangur

Árið 1865 var eitt merkisár hjá føroyskum útróðri. Tá gjørdi danska fólkatingið av, at sokallaða 'bátsbandið' í Føroyum skuldi verða tikið av. Við tí fór eitt tíðarskeið í føroyskari mentanarsøgu aftur um bak, og eitt annað tók við.

Hvat var hetta fyri ein skipan? Í viðmerkingunum til fólkatingslógina, ið setti hana úr gildi, verður greitt soleiðis frá:

'Fra gammel Tid paahviler der visse færøske Jordejendommes Besiddere Forpligtelse til at holde store Fiskerbaade og andre af Færøernes Indbyggere Forpligtelse til at gøre Tjeneste paa disse Baade. Om dette Forhold haves der ingen Lovbestemmelser, naar undtages den ved Plakaten af 23. Marts 1813 bekendtgjorte kongelige Resolution af 13. s. M. om, at Sager angaaende Rettigheden til at bygge og holde Fiskerbaade paa Færøerne skulle som Politisager paakendes af hvert Steds Sysselmand, samt at Sysselmændenes Kendelser, naar Parterne ej ville akkviescere ved samme, skulde indankes for Amtmanden, og af ham uden videre Appel paakendes; men iøvrigt er Forholdet ordnet ad Sædvanens Vej'[1].

Í viðmerkingunum til fólkatingslógina verður eisini nomið við, hví bátsbandsskipanin varð tikin til viðgerðar og tikin av við lóg. Skipanin var ein forðing fyri frælsari menning af føroyskum vinnulívi, sum hevði fingið nýggjar fyritreytir, tá kongaliga einahandilsskipanin varð tikin av í 1856. Og hon gekk ímóti § 88 í grundlógini frá 1849, sum segði, at 'alle Indskrænkninger i den frie og lige Adgang til Erhverv,

som ikke ere begrundede i det almene Vel, skulle hæves ved Lov'[2].

Hugtakið 'bátsband' er illgitið í oyrunum á mongum. Tað verður tíðum sett í samband við ta harðrendu viðferð, føroyingum var fyri, tá danakongur hevði einræði í ríki sínum, og Føroyar vórðu stýrdar av monnum hansara. Men tað vóru ikki øll, ið vóru misnøgd. Í fleiri bygdum var heitið als ikki kent, aðrastaðni høvdu teir hugtøk við meira hvørkisligum klangi um skipanina, t.d. 'bátshandil', og onkustaðni vita teir ikki um misnøgd í sambandi við hana[3]. Líkt er tí til, at ymist var, hvussu skipanin virkaði og var dámd frá bygd til bygd. Orðaskiftið millum manna undan avtøkuni hava vit ikki kunnleika um, men tey mongu rættarmálini, ið umrødd eru í tingbókunum, vátta, at skipanin ofta elvdi til stríð.

Eftir at skipanin var tikin av, og fyritreytirnar fyri føroyskum samfelagsbúskapi høvdu verið fyri broytingum, kyknaði nýtt orðaskifti um bátsbandið, nú við hugsjónarligum atliti. Bátsbandsskipanin varð nýtt í politiska orðaskiftinum til at lýsa órímuligu støðuna hjá verkamonnum og ognarleysum í einum samfelag, har tey, ið sótu við jørð, høvdu serlig rættindi. Politiska viðgerðin av evninum gjørdi sjónarmiðini meira avgjørd enn gott var, og rættiliga øði spann tað í mong, tá ið danski javnaðarmaðurin og forsætismálaráðharrin, Thorvald Stauning, í eini útvarpsrøðu í 1938 sammetti føroyska bátsbandið við tað sera illgitna stavnsbandið í Danmark – ein skipan, ið sýtti donskum bóndum at flyta frá góðsinum, teir hoyrdu til, og hevði til endamáls at tryggja góðseigarunum bíliga arbeiðsmegi.

**Bátsbandsskipanin**

Bæði av viðmerkingunum til fólkatingslógina, ið avtók bátsbandið, og tí, ið fólk síðani í orði og á skrift hava greitt frá, sæst, at samanbering Staunings er burturvið. Í viðmerkingunum til fólkatingslógina verður tikið soleiðis til:

'Forholdet imellem Baadsejeren og Mandskabet er nærmest at betragte som et Slags Interessentskab, idet Mandskabet ikke kan gøre Fordring paa nogen direkte Betaling for sit Arbejde, men kun paa Andel i Udbyttet som deles imellem Mandskabet og Baadsejeren, saaledes at hver Mand faar en Part og Baadsejeren en Part særskilt for Baaden, om han end er med den, saa at f. Eks. Fangsten paa en Baad med 8 Mands besætning deles i 9 Dele, hvoraf en tilfalder Baaden'[4].

Yngru keldurnar geva somu mynd. Víst kundi ósemja taka seg upp og rættarmál spyrjast burturúr, og víst tálmaði skipanin menningini í føroyskum vinnulívi í 19. øld, men hon hevði eisini við sær sosiala trygd í bygdarsamfelagnum og gav øllum arbeiðsførum monnum rætt at søkja sjógvin um veturin við tryggum fari. T.d. kundi maður ikki verða koyrdur av bátssessi sínum móti sínum vilja[5], og bátur undir skipanini hevði skyldu til at taka mann við, ið var til avlops, um tað yvirhøvur var gjørligt[6]. Skipanin gav tí ikki bátseigarunum høvi at eyðræna tey, ið ikki áttu bát, men var tvørturímóti bygd upp um sínámillumábyrgd í bygdarsamfelagnum.

At skipanin harafturat neyvan var áløgd av kongsvaldinum eins og stavnsbandið í Danmark, men heldur hevði røtur sínar í føroyskum samfelagslívi, geva bæði til-

knýti hennara til skipanina av bygdarsamfelagnum og útsøgnin í lógarviðmerkingunum um, at skrivað lógargrundarlag var ikki kent, ábendingar um.

Keldan, danska fólkatingið nýtti undir viðgerðini av avtøkulógini, var ein frágreiðing frá amtmanninum í Føroyum, Peter Holten[7]. Hann greiddi frá, at bátsbandsskipanin bert var galdandi fyri bátar av slíkari stødd, at teir kundu verða nýttir um veturin. Frá yngri heimildum vita vit, at áttamannafarið var mest nýtta bátastødd í vetrarhálvuni, men eisini at seks- og tíggjumannafør vórðu nýtt[8]. Harafturat hevur heimildarmaður úr Nólsoy sagt frá, at sum hann visti, vóru fýramannafør og smærri bátar ikki undir skipanini[9]. Smærru bátastøddirnar vórðu serliga nýttar til summarútróðurin.

Amtmaðurin greiddi eisini frá, at manningin til fiskiførini varð fest fyri eitt hálvt ár í senn við skiftidøgum 1. mai og 1. november. Um bátseigarin tá ikki kundi fáa manning við sjálvbodnari semju, kundi hann krevja, at sýslumaður útnevndi arbeiðsførar menn í bygdini til tænastu, tó soleiðis, at eldri bátar høvdu framíhjárætt fram um yngri[10]. Yngru heimildirnar siga nakað tað sama, at bátssessirnir vórðu festir á grannastevnu, og at sýslumaður dømdi í trætum[11].

Sambært frágreiðingini hjá amtmanninum høvdu nakrir bátar framíhjárættindi at verða mannaðir fram um aðrar. Hetta verður tó sagt á slíkan hátt, at ivamál spyrst burturúr. Teir eldru bátarnir høvdu framíhjárætt fram um teir yngru. Henda fatan sæst eisini hjá yngri heimildum[12], men illa hugsandi er tað, at bóndi skal hava góðtikið, at bátur hansara misti framíhjárættindi til besta fólkið, bert tí hann hevði fingið sær betri og nýggjari far.

Nakrar yngri heimildir geva tó betri fatan av hesum. Jóan Christian Poulsen í Hesti sigur frá, at hóast fleiri stórir bátar vóru har í bygdini, vistu menn bert um tann eina, ið var undir bátsbandinum[13]. Eisini í frágreiðingum frá gjáarmonnum og mikladalsmonnum sæst henda fatan[14]. Framíhjárætturin til fólk lá hjá einum ávísum báti, uttan mun til, hvussu gamal báturin var. Hesin bátur varð nevndur ‘fyrndarbátur’. Tá hann hevði fingið manning, varð fólkið til hinar bátarnar býtt.

Við hesum í huga gevur amtmannsins lýsing betri meining. Tað vóru teir, ið seinast høvdu fingið sær bát sjálvir og ikki høvdu havt bát frammanundan, ið høvdu síðsta rætt til manning, og ikki teir, ið høvdu skift sær bátin út við ein nýggjan. Yngsti báturin merkti ikki tað sama sum tann nýggjasti, men tann yngsti í skipanini. Men allir bátar stóðu undir fyrndarbátinum.

Sambært viðmerkingunum til fólkatingslógina var ognarrætturin til stóru bátarnar tilskilaður ávísum av teimum, ið sótu við jørð. Samband var sostatt millum jørð og bát. Yngru heimildirnar siga nakað tað sama, at tað vóru bøndurnir, ið høvdu bátshaldsrættin. Men tær koma ikki nærri inn á tað, amtmaðurin nevnir, at tað bert var ávís, og ikki øll jørð, ið átti bátsrætt. Tær sýna tó ofta ta fatan, at bátshaldsrætturin lá hjá teimum, ið sótu við kongsjørð.

At einans kongsjørðin átti bátshaldsrættin er tó eitt samband, ið spurnaðartekin kann verða sett við. At hetta kundi vera so, kom ikki Jóan Christiani Poulsen til hugs,

tá ið hann undir viðgerðini av evninum í bókini Hestsøga undraði seg yvir, at bert tann eini báturin í Hesti var undir bátsbandinum. Hvørki hann ella nakar av bygdarfeløgum hansara vistu nakra orsøk, hví so var[15]. Heldur ikki í eldri rættarmálum um bátshald vinnur áskoðanin frama, og í teimum sera upplýsandi tabellunum, Løbner kommandantur lat gera yvir búskaparstøðu føroyinga í 1814, er púra greitt, at eisini óðalsmenn kundu hava ogn í stórum báti.

Flestu keldurnar eru tó samdar um, at samband var millum at sita við jørð og at eiga í báti, og sambært frágreiðingini hjá amtmanninum var jørðin ein høvuðsspurningur í bátsbandsskipanini. Fyri at koma kjarnuni nærri, er tí neyðugt at meta um, hvørjum sambandið kann hava verið samansett av. Sum so mangan í føroyskari søgu, er keldutilfarið illa atkomuligt. Men ein kelda er, ið kann benda okkum á leið. Hon er tær áðurnevndu tabellirnar frá 1814, sum bæði geva upplýsingar um jørð og bát.

**Tabellir Løbners**

Í tabellunum hjá Løbner verða skrásett øll húski í Føroyum og fíggjarliga støði teirra í kongsjørð, óðalsjørð, uppsitarajørð, neytum, seyði, fugli, sákorni, bátspørtum og pørtum í fiskiveiði. Tabellirnar geva tí eisini møguleikar fyri at kanna, í hvønn mun samband var ímillum ogn í stórum báti og jørð.

Tabellirnar nevna bert tær tríggjar bátastøddirnar, fýramannafør, seksmannafør og áttamannafør. Hesar vóru tær vanligastu, men líkt er til, at aðrar bátastøddir eru roknaðar upp í hesar. Harafturat nevna tær bert bátar, ið vóru fiskifør, og ikki bátar, sum vórðu nýttir til flutning ella grind burturav.

271 fýramannafør, 85 seksmannafør og 127 áttamannafør vóru í Føroyum í 1814. Fólkatalið var 5247 býtt millum 1853 húski. Havnin er einasta pláss í landinum, har tabellirnar ikki gera upp hvørt húski sær. Har vóru 522 fólk, 154 húski, 7 áttamannafør og 25 fýramannafør. Verður Havnin ikki tikin við, vóru 1699 húski í Føroyum. Av teimum áttu 329 ella 19% part í áttamannafari og 175 ella 10% part í seksmannafari. 80 húski ella 5% áttu bæði part í áttamannafari og seksmannafari. 404 ella 24% av øllum húskjum uttanfyri Havnina høvdu sostatt ogn í stórum báti.

Trý av teimum 404 húskjunum við báti eru ikki skrásett við jørð, og talan er helst um serlig viðurskifti. Tey 401 húskini, ið eftir verða, vóru 46% av teimum, ið sótu við jørð, t.v.s. 876 húski. Hetta er í samsvari við viðmerkingarnar til fólkatingslógina um, at bert ein partur av teimum, ið sótu við jørð, áttu í stórum báti við sambandi til bátsbandsskipanina. Men spurningin, hvørjum sambandið millum jørð og bát var samansett av, greiðir hetta ikki.

Ein ábending um tað fæst tó í tí elsta rættarmálinum um bátshald, vit hava kunnleika um. Tann 1. august 1672 læt tann lógarkøni Petur Antonison í Norðragøtu, sum í mong ár var løgrættumaður, lesa upp úrskurð, fútin hevði gjørt í trætu millum hann og grannar hansara 14 ár frammanundan. Úrskurðurin segði, at teir, ið búðu á teimum somu 16 merkrunum, sum Petur búði á, skuldu rógva á hansara báti[16].

Petur Antonison kenna vit eisini úr jarðarbókunum. Hann hevði festini í Tjørnustovu og Mortansstovu. Tjørnustovufestið

var um tað mundið 2 merkur og somuleiðis Mortansstovufestið. Petur tykist sostatt bert at hava sitið við einum parti av teimum 16 merkrunum, sum vóru støðið undir rættarkravi hansara, og neyvan við nógv meira enn teimum 4 merkrunum. Aðrir sótu við restini. Kanska var Petur heldur ikki einsamallur eigari av bátinum, tí í tabellunum hjá Løbner hevði Tjørnustova 1/4 ognarpart í áttamannafari og Mortansstova ongan. Staðfestingin av hesum viðurskiftum gevur okkum eitt betri støði fyri útleggingini av tí avgerandi útsøgnini í fútans úrskurði. Í Norðragøtu vóru 16 merkur í jørð, sum løgfrøðisliga vóru roknaðar sum ein heild, hóast tær vóru sundurbýttar millum fleiri ánarar. Til hesa jarðarheild hoyrdi ein bátur, ið hevði framíhjárætt fram um aðrar bátar at verða mannaður.

Rættarmálið hjá gøtumanninum stingur okkum soleiðis kósina í rannsókníni eftir upprunanum til framíhjáréttin hjá fyrndarbátinum í bátsbandsskipanini. Leitað kann verða eftir dømum, har bátur kann staðbindast til jørð, ið løgfrøðisliga kann hava verið ein heild, og her eru tabellirnar hjá Løbner góð hjálp.

Løbners tabellir eru sum nevnt bygdar upp um eina skráseting av húskjum. Hvørt húskið verður frámerkt við nøvnum teirra, ið stóðu fyri teimum. Nøvnini geva okkum møguleika at leita aftur um tabellirnar at staðbinda tey, ið høvdu ogn í báti, til jørð, tey sótu við. Slík kanning er sera drúgfør, tí skil skal bæði verða fingið á byggisøguligum viðurskiftum í sambandi við jørðina og á ættargranskingarligum spurningum. Fyri at lætta um, havi eg tí valt at avmarka kanningina til Norðoyggjar, har fyrireikingararbeiðið longu er gjørt og útgivið[17].

Við støði í upplýsingunum úr Norðragøtu kann verða ætlað, at á búplássum ella bygdum við bert einum stórum báti skrásettum, t.v.s. annaðhvørt seksmannafari ella áttamannafari, hevði tann báturin tilknýti til eina jarðarheild og hevði støðu sum fyrndarbátur. Í Norðoyggjum hava menn Løbners skrásett 9 bygdir ella búpláss, har bert tann eini stóri báturin var. Tað er í Hvannasundi, á Norðtoftum, í Múla, á Norðoyri, í Gerðum, í Upsalum, á Blankaskála, á Trøllanesi og í Haraldsundi.

Í tabellunum er skrásett kongsjørð, óðalsjørð og uppsitarajørð hjá hvørjum einstøkum húski. Nú roynast skal at seta uppgivnu jørðina í samband við møguligar jarðarheildir, stinga trupulleikar seg tó upp. Í sambandi við kongsjørðina eru ivamálini fá, tí gott samsvar er millum tað, tabellirnar uppgeva, og jarðarbøkurnar. Tabellirnar geva sostatt eina rætta mynd av kongsjørðini á teimum ymisku plássunum. Verri er við uppgávuni av óðalsjørðini og uppsitarajørðini, tí verður tað uppgivna markatalið fyri bygdina samantalt, verður úrslitið øðrvísi enn tað í veruleikanum var. Orsøkin er, at ikki er víst, at óðalsjørðin, eitt húski verður skrásett við, lá í somu bygd, húskið sjálvt búði í. Maður kundi eiga jørð í aðrari bygd og hava uppsitara fyri seg har. Í slíkum føri verður tann sama jørðin skrásett tvær ferðir í tabellunum, t.v.s. bæði hjá eigaranum og hjá uppsitaranum, eigarin hevði fyri seg í bygdini, har jørðin var. Tann sama jørðin var jú inntøkugrundarlag hjá báðum, og inntøkugrundarlagið var tað, tabellirnar skuldu lýsa. Avleiðingin av hesum er, at í metingunum av jarðarheildum, ið kunnu

hava ligið til grund fyri fyrndarbátum í bátsbandsskipanini, má fyrivarni verða tikið fyri óðalsjørð, tabellirnar uppgeva. Harafturímóti er tað av somu orsøk sannlíkt, at uppsitarajørðin, ið húski verða skrásett at sita við, lá í somu bygd sum húskini eru skrásett at búgva í.

Bygdin í Hvannasundi er 16 merkur, ið allar eru kongsjørð. 4 húski búðu har í 1814, og tey høvdu 4 merkur í festi hvørt. Eitt áttamannafar var í bygdini. Eins og jørðin vóru ognarpartarnir í bátinum javnt býttir millum húskini. Í Hvannasundi tykjast sostatt tær 16 merkurnar í bygdini hava verið jarðarheildin, ið lá til grund fyri bátinum.

Sama mynstur er at finna á plássunum Norðoyri, Gerðar, Blankaskáli og Trøllanes. Hóast teir ikki vóru eins javnt býttir og í Hvannasundi, áttu øll húski við jørð ognarpart í stóra bátinum, og roknast kann við, at størsti parturin av jørðini var rættarstøði fyri honum. Umframt aðra jørð sótu teir, ið áttu í báti, við kongsjørð. Á Norðoyri hevði ein bátseigari tó ikki kongsjørð, men nógva óðalsjørð, sum vit vita var í bygdini[18]. Somuleiðis høvdu tríggir bátseigarar á Blankaskála ikki kongsjørð, men umframt óðalsjørð aðalsjørð í hondum[19]. Norðoyri er 24 merkur, Gerðar 22 1/4 merkur, Blankaskáli 16 3/4 merkur og Trøllanes 16 merkur.

Á Blankaskála var tó eitt húski við jørð, ið ikki hevði ognarpart í bátinum. Húsið var ikki til í 1801, tá fólkateljing var, og tað verður heldur ikki roknað millum gomlu búnaðirnar á plássinum[20]. Hetta gevur okkum ábendingar um, at hóast øll jørðin í bygdini var rættarstøðið fyri bátinum, vóru tað bert búnaðir, ið vóru vorðnir til áðrenn ávíst tíðarhvarv, ið høvdu varðveitt ognarrættin til fyrndarbát. Tekin eru sostatt um, at talan er um skipan, ið var stirðnað.

Á hinum plássunum, har bert tann eini stóri báturin var, áttu ikki øll húskini við jørð í bátinum. Norðtoftir var 4 merkur (1/2 mk. kongs), Múli 10 merkur (2 1/2 mk. kongs), Upsalir 15 1/2 merkur (4 1/2 mk. kongs) og Haraldssund 16 merkur (9 mk. kongs). Á hesum plássum fáast tabellirnar hjá Løbner illa til at geva ábendingar um jarðarheildir í sambandi við bát.

Á Norðtoftum var bert ein bátseigari. Umframt festijørðina á Toftum hevði hann festijørð í Depli og nógva óðalsjørð, sum ikki kann staðbindast. Ein partur var kanska á Toftum, kanska hevði onkur annar á plássinum partar av henni í hondum, og nógv kann hava ligið burtur í aðrari bygd.

Í Múla vóru sum nevnt 10 merkur. Har vóru 3 húski í 1814, og sambært tabellunum sótu tey við tilsamans 8 1/2 merkrum, t.v.s. bæði í kongs-, óðals- og uppsitarajørð. Ein partur av teimum 10 merkrunum hava tískil verið í ogn hjá avbygdafólki, eins og ongin vissa er fyri, at øll jørðin, ið er skrásett hjá húskjunum í bygdini, veruliga var á plássinum. Tvey av húskjunum í Múla høvdu ogn í bátinum, ið var eitt seksmannafar.

Eins og í skrásetingunum av Blankaskála fáast ábendingar í teimum úr Múla um, at ognin í bátinum var knýtt at teimum eldru búnaðunum í bygdini, tí triðja skrásetta húskið í 1814 tykist ikki hava verið sjálvstøðugt í jarðarrættsligum høpi[21].

Upsalir vóru sum nevnt 15 1/2 merkur. 11 húski búðu har í 1814, men bert eitt

teirra átti bátin. Tað sat við 2 1/2 merkrum í kongsjørð og 2 merkrum í óðalsjørð. Sostatt sat tað bert við uml. einum triðingi av samlaðu jørðini á plássinum, sum eftir mynstrinum omanfyri øll skuldi verið støðið fyri bátinum. Hvørki tabellirnar ella aðrar upplýsingar, ið eru til skjals um jarðarviðurskiftini har, geva ábendingar um, hví so var.

Í Haraldssundi vóru 3 húski, men bert 2 teirra høvdu ogn í bátinum. Tað vóru valahús, ið sótu við meginpartinum av jørðini í bygdini, t.v.s. allari kongsjørðini, vóru uppsitarar hjá avbygdamonnum og høvdu nógva óðalsjørð. Jørðin sum heild á plássinum kann tí væl hava verið rættarstøði fyri bátinum. Viðurskiftini í Haraldssundi í sambandi við hetta eru tó ikki heilt greið.

Við støði í rættarmálinum hjá Peturi Antonison í Norðragøtu, har tað kom fram, at ávís jarðarheild var rættarstøði fyri fyrndarbáti, er omanfyri kannað, um tílík jarðarheild kann staðfestast í sambandi við bát á búplássum í Norðoyggjum, har bert tann eini báturin var. Arbeiðssetningurin var, at slíkur bátur kundi verða sammettur við fyrndarbát. Niðurstøðan er, at ikki á øllum plássum er hetta gjørligt, men onkustaðni er mynstrið týðuligt. Ábendingar eru um, at jarðarheildin, ið stóð í sambandi við bátin, var øll jørðin á plássinum. Á Norðoyri fingust eisini ábendingar um, at tað var líka mikið, um jørðin var óðals ella kongs.

Felags fyri tey omanfyri nevndu plássini er, at tey vóru smá, bert nøkur fá hús, ið stóðu samantrunkað á einum avmarkaðum stað, teirri fornu heimrustini. Bæði fornfrøðiliga og byggisøguliga er tað áður víst á, at samband er millum forna heimrust og fornan garð. Forni garðurin varð við tíðini sundurbýttur í fleiri hús og gjørdist ein býlingur. Henda gongd byrjaði longu í víkingatíð[22]. Sammett við úrslitini omanfyri gevur hetta sostatt ábendingar um, at rættarliga hugtakið 'fyrndarbátur' varð nýtt um bát, sum hoyrdi til jørðina hjá fornum garði. Tá hesin varð sundurbýttur, vórðu eisini rættindini til ognina í bátinum skift, men báturin helt fram at hoyra til jørðina í býlinginum.

Verður nú hugt at teimum plássum í Norðoyggjum, har fleiri býlingar vóru í einari bygd, sæst, at hetta hugsunarúrslit ikki er burturvið.

Á Viðareiði vóru 14 húski í 1814. Tey taldu 85 fólk. Av teimum vóru 26 menn yvir 15 ár. Av stórum bátum hevði bygdin 3 áttamannafør og 3 seksmannafør. 6 húski høvdu ogn í teimum, og tey áttu bæði part í áttamannafari og seksmannafari. Upplýsingarnar, tabellirnar geva um viðurskiftini í sambandi við bátarnar, eru hesar:

| Husfædres navn | Folke-tal | Mænd o. 15 | Fæste-jord | Odels-jord | Op-sidder-jord | 8-m-f | Fangst parter | 6-m-f | Fangst parter |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Præstens Huus | 6 | 2 | 12 mk | | | 1 | 3 | 1 | 3 |
| Madam Østerø | 5 | 1 | 4 mk | 3 gl | | | 1 | | 1 |
| Justinus Joensen | 6 | 1 | | | | | 1 | | 1 |
| Absalon Joensen | 11 | 6 | 8 mk | 8 mk 9 gl | | 1/2 | 4 1/2 | 1/2 | 4 1/2 |
| Niels Jensen | 10 | 3 | 8 mk | 1 mk 4 gl | | 1/2 | 3 1/2 | 1/2 | 3 1/2 |
| Simon Danielsen | 8 | 3 | 6 mk | 10 gl | | 1/2 | 3 1/2 | 1/2 | 3 1/2 |
| Johan H. Matras | 9 | 2 | 2 mk | 2 mk 8 gl | | 1/6 | 2 1/6 | 1/6 | 2 1/6 |
| Jens Jensen | 9 | 3 | 4 mk | 3 mk | | 1/3 | 2 1/3 | 1/3 | 2 1/3 |
| Johannes Petersen | 3 | 1 | | 1 mk 12 gl | | | 1 | | 1 |
| Johannes Petersens Enke | 3 | 1 | | 1 mk 2 gl | | | 1 | | 1 |
| Jacob Magnussen | 6 | 1 | | 1 mk 6 gl | | | 1 | | 1 |
| Joen Gregersens Kone | 1 | | | | | | | | |
| Peter Johannesen | 7 | 2 | | 1 gl | 5 gl | | 1 | | 1 |
| H.A. Matras Enke | 1 | | | | | | | | |
| **Sammentælling** | **85** | **26** | **44 mk** | **20 mk 7 gl** | **5 gl** | **3** | **25** | **3** | **25** |

**TALVA 1. Úrdráttur úr tabellum Løbners frá 1814 um húskini á Viðareiði.**

Teigurin við fiskipørtum sigur frá, hvussu veiðan hjá bátunum varð býtt millum húsini. Teigurin vísir eisini, at tað ikki bert vóru húsini, men eisini bátarnir sjálvir, ið fingu part av fonginum – eins og viðmerkingarnar til fólkatingslógina siga frá. Veiðan á áttamannafari var býtt í 9 partar, har 8 fóru til manningina og 1 til bátin. Fiskiparturin, ið var til bátin, varð róptur bátspartur. Hann fekk bátseigarin fyri at halda bátin. T.d. svarar tann hálvi fiskiparturin, ið Absalon Joensen á Viðareiði er skrásettur við av áttamannafari, til ogn hansara í helvtini av einum áttamannafari, og tað var bátspartur hansara. Teir 4 heilu fiskipartarnir hjá honum siga frá, at hús hansara læt 4 menn til bátin.

Um bátspartarnir til tey trý áttamannaførini og tey trý seksmannaførini verða frádrignir samlaða talinum av fiskipørtum, ið var 25, sæst, at 22 av teimum 26 monnunum á Viðareiði høvdu sess á stórum báti.

Í talvuni omanfyri sæst harafturat, at teir somu menninir høvdu sess bæði á áttamannafari og seksmannafari. Allir, sum eru skrásettir við fiskiparti úr áttamannafari, eru eisini skrásettir við fiskiparti úr seksmannafari. Allir bátarnir hava tískil ikki róð út í senn. Men væl kann tað vera, at teir allir vóru vetrarbátar og undir bátsbandsskipan-

ini, tí vanligt var, at hvør bátastøddin varð nýtt til hvør sína tíð á vetrinum[23].

Til bygdina á Viðareiði hoyra 48 merkur av jørð, sum frá gamlari tíð hava ligið í trimum eindum, ið hvør var 16 merkur. Bygdin hevði í 1814 4 býlingar. Tveir teirra, Ónagerði og Heygar, høvdu 16 merkur hvør, og býlingarnir Forlendi og við Garð høvdu tilsamans 16. Greitt er tað tó, at býlingarnir Forlendi og við Garð uppruna-liga vóru í einum, tí jørðin hjá teimum liggur saman, og heilt til okkara dagar hava teir verið nevndir við felagsnavninum 'Uppi á Bø', sum er gamla garðs- ella býlingsnavnið. Í jarðarbókini frá 1584 sæst, at býlingurin Uppi á Bø longu tá var farin sundur í tveir[24].

Verður nú kannað, hvar teir búðu, ið høvdu ogn í stórum báti, sæst sama mynstur sum tað, ið ábendingar eru fingnar um omanfyri. Prestur, sum búði í Ónagerði, átti einsamallur eitt áttamannafar og eitt seksmannafar. Absalon Joensen og Niels Jensen, sum báðir høvdu hálvan ognarpart í áttamannafari og seksmannafari, sótu við teimum báðum festunum á Heygum. Gamli garðurin har var býttur sundur í 1628. Simon Danielsen og Johan W. Matras, sum ávikavist høvdu 1/2 og 1/6 ognarpart í áttamannafari og seksmannafari, sótu við teimum báðum festunum í Forlendi. Og Jens Jensen, sum átti tann seinasta triðingin, hevði festi við Garð.

Tað er sostatt týðuligt, at á Viðareiði var bátshaldið tengt at garðinum í Ónagerði, gamla garðinum á Heygum, ið farin var í tvíningar, og jørðini hjá gamla garðinum Uppi á Bø. Á Viðareiði fáa vit harafturat ávíst enn týðuligari, at jarðarheildin, talan er um, var ein upprunagarður, sum við tíðini var uppbýttur millum fleiri húski í ein býling og eisini kundi vera vorðin til fleiri býlingar. Tann greiða uppbýtingin av ognarpørtunum í bátunum millum upprunagarðarnar bendir eisini á, at allir bátarnir á Viðareiði høvdu støðu sum fyrndarbátar.

Sama mynstur sæst eisini í Hattarvík og á Húsum, har meira enn ein býlingur var. Í Hattarvík vóru 6 hús og 34 fólk. Av teimum vóru 11 menn. Býlingarnir vóru tveir, Uppi í Húsi og Niðri í Húsi. Uppi í Húsi vóru 8 menn, og býlingurin hevði bæði áttamannafar og seksmannafar. Ognin í bátunum var javnt býtt millum tey bæði kongsfestini, ið vóru, meðan triða húsið í býlinginum, ið var óðalshús, ikki hevði ognarpart. Navnið á upprunagarðinum har var Kellingagarður og er enn kent í fólkaminninum. Longu áðrenn 1584 var hann sundurbýttur í fleiri hús[25].

Býlingurin Niðri í Húsi verður eisini róptur Húsagarður, ið er gamla garðsnavnið. Í 1814 vóru har trý hús, øll við festijørð, og øll við 1/3 ognarparti í áttamannafari. Manning var tó ikki í býlinginum til bátin. Bert tríggir arbeiðsførir menn vóru, men hóast tað varð báturin hildin. Símun Hansen greiðir frá, at teir Niðri í Húsi róðu út saman við teimum Uppi í Húsi, annaðhvørt ár við bátinum har niðri og annaðhvørt ár við bátinum har uppi[26].

Á Húsum vóru 8 húski. Tvey av teimum høvdu jørð í festi, hini høvdu óðalsjørð og uppsitarajørð. 43 fólk búðu í bygdini, og 16 teirra vóru menn. Hóast tað ikki er vanligt at siga, at bygdin hevur býlingar, geva staðarnøvnini 'Heimi á Garði' og 'Norð í Garði' ábendingar um tveir fornar garðar[27].

Onki seksmannafar var í bygdini, men tvey áttamannafør. 7 húski høvdu ognarpart í teimum. Sambært nøvnunum, ið Løbners tabellir uppgeva, er tað heilt greitt, at annan bátin áttu tey, ið búðu Heimi á Garði, og hin áttu tey Norð í Garði.

Í bygdunum í Svínoy og í Kunoy eru eisini meira enn ein býlingur, men har eru viðurskiftini minni greið. Í báðum bygdum vóru tveir býlingar og tvey áttamannafør. Í so máta líkjast viðurskiftini teimum á Viðareiði, Húsum og í Hattarvík. Men í Svínoy var har umframt eitt seksmannafar, har eigarin, ið var einsamallur um bátin, eisini átti part í áttamannafari. Í hvørgari bygdini ber til at seta áttamannaførini í samband við jørð í hvør sínum býlingi, tí líkt er til, at menn úr hvør sínum býlingi hildu bát í felag.

**Niðurstøða**

Tabellirnar hjá Løbner geva soleiðis fleiri ábendingar um tað sama, sum rættarmálið hjá Peturi Antonison í Norðragøtu í 1658 vísti á, at rættarstøðið fyri fyrndarbátinum var jørð, sum hóast sundurbýtt varð mett at hoyra saman. Í tabellunum hava vit harafturat fingið greiði á, at jarðarheildirnar kunnu verða sammettar við ta jørð, ið hevði hoyrt til ein upprunagarð. Til ber sostatt at taka samanum og siga, at skipanin um fyrndarbát hevði støði í fyrndargomlum rættarviðurskiftum, ið høvdu tilknýti til upprunagarðarnar í elstu tíðum. Hetta var uttan mun til, um jørðin við tíðini var vorðin festijørð ella hevði varðveitt óðalsstøðuna.

Eitt er, at skipanin um fyrndarbát var grundað á rættarviðurskifti í sambandi við upprunagarðarnar. Niðurstøðan av útgreiningini omanfyri má eisini vera, at skipanin sum so var stirðnað, tí hon var grundað á viðurskifti, ið vóru farin. Gomlu garðarnir vóru ikki til longur, jarðarheildirnar vóru meira og minni sundurbýttar, og fíggjarligu fortreytirnar hjá teimum einstøku húskjunum vóru broyttar. Umframt alt hetta hevði føroyska rættarsamfelagið verið fyri broytingum síðani elstu tíðir, og nýggjar rættarhugsjónir komu inn so við og við.

Í nøkrum av yngru keldunum fáa vit fatan av, at misnøgdin við bátsbandsskipanina serliga valdaði millum óðalsmenn, ið vóru noyddir at rógva við bóndans báti. Teir sluppu ikki at fáa sær bát sjálvir. Aðrastaðni, sum í Hesti, fáa vit fatan av, at lítil ella ongin misnøgd var, og at eisini óðalsmenn høvdu bát. Rættarmálið hjá Peturi Antonison í Norðragøtu í 1658 gav okkum tó heilt aðra fatan. Tað var ikki bert millum teir, ið ikki áttu í báti, misnøgdim valdaði, men eisini millum bøndur, sum høvdu ogn í fyrndarbáti. Tað sama sæst í vártingssak hjá svínoyingum frá 1711. Bæði í Norðragøtu og í Svínoy var orsøkin, at eigarar av fyrndarbáti høvdu fingið sær bát umframt[28]. Hetta tykist hava verið vanligt og ivaleyst eisini neyðugt, um fyrndarbáturin ikki nøktaði tørvin á plássinum. Trupulleikar stóðust helst heldur ikki av tí, – ikki fyrr enn bátarnir vórðu ov nógvir, tí menn fullu frá, og onkur av medeigarunum í fyrndarbátinum fór at mangla fólk, talaði at og kanska stevndi.

Í sakunum úr Norðragøtu og Svínoy eru sostatt tekin um, at longu miðskeiðis í 17. øld var støðið undir skipanini um fyrndarbát farið at ridla. Hvønn veg, leiðin bar,

sæst í sakini hjá svínoyingum.

Vártingið varð sett 4. mai norðri í Vági, har norðoyasýslumaður, umboð fyri sorinskrivaran og 8 løgrættumenn, ið allir vóru kongsbøndur í Norðoyggjum, sótu í rættinum. Saksøkjari var kongsbóndin í Gulaksstovu í býlinginum Heima á Bø í Svínoy. Teir saksøktu vóru kongsbøndurnir í Heimistovu, Yvirstovu og Uppi í Húsi, allir í býlinginum Heima á Bø, og óðalsmaðurin Mikkjal Grækarisson, ið búði Úti á Lað í býlinginum Úti á Bø. Gulaksstovubóndin vildi hava hinar at lata sær ein mann úr hvørjum teirra bátum at rógva út við sær, tí tað helt hann vera rímuligast, nú teir fimm høvdu tann bátin í felag.

Bæði av tí at teir vóru fleiri bøndur, ið høvdu bátin, og tí Gulaksstovubóndin helt seg kunna fara í rættin við málinum, er líkt til, at talan var um bát við løgfrøðiligum framíhjárættindum. Upplýsingarnar frá 1711 kunnu væl samsvara við tabellirnar hjá Løbner frá 1814, sum tó eru heldur fløktar, tí tey fimm húsini áttu tilsamans hálvtannað áttamannafar. Gulaksstovubóndin er í tabellunum skrásettur við 1/4 ognarparti í áttamannafari, Yvirstovubóndin við 1/2, bóndin Uppi í Húsi við 1/4, húsið Úti á Lað við 1/8 og Heimistovubóndin við 3/8 ognarparti.

Allir teir stevndu bjóðaðu at lata ein mann úr sínum báti. Teir góðtóku sostatt skylduna, bátsbandsskipanin álegði. Men óðalsmaðurin setti treytir við. Hann vildi lata ein mann, um maðurin sjálvur vildi. Úrslitið var, at sýslumaður tók málið til dóms.

Dómurin sýnir, at eisini dómsvaldið gjørdi sítt til at máa støðið undan gomlu bátsbandsskipanini. Dømt varð, at av tí at meira fólk ikki var í oynni, skuldu bátarnir bert vera 4 við seks monnum í hvørjum, hetta fyri at bátur og manning altíð skuldu vera til flutning av embætismonnum og presti. Hetta síðsta lá myndugleikunum frammarliga í huga[29]. Bátarnir skuldu vera teir, ið kongsbøndurnir áttu, ímeðan báturin hjá óðalsmanninum at kalla varð sagdur av. Bátarnir hjá kongsbøndunum skuldu mannast, áðrenn nakar bátur, óðalsmaður átti, varð mannaður, og sýslumaður skuldi býta fólkið.

Lagt verður til merkis, at dómurin ikki tekur støði í rættindum, ið høvdu samband við eina jarðarheild, men heldur í slagnum av jørð, teir høvdu, ið skuldu hava framíhjárættindi. Tekin eru um, at rætturin, ið var mannaður við kongsbøndum, legði størri dent á at fjálga um áhugamálini hjá kongsbóndastættini enn um fornan rætt. Hetta samsvarar við ta fatan, nakrar av yngru keldunum góvu, at bátshaldsrætturin var tilskilaður teimum, ið sótu við kongsjørðini. Tað bendir tí eisini á, at gamla rættarstøðið fyri bátsbandsskipanini longu miðskeiðis í 17. øld, t.v.s. tíðliga í einavaldstíðini, var í ferð við at vera skotið til síðis, og at dómsmyndugleikarnir í Føroyum, sum umboðaðu einaveldið, og kongsbøndurnir, ið sótu í rættinum, við úrskurðum sínum líðandi gjørdu fortilburðir fyri nýggjum rættarstøði, sum bar frá tí gamla við bert at vera grundað á kongsjørðina. Slík skipan gjørdi stættarmun, og skilligt er, at óðalsmenn dámdu hana lítið, har hon vann frama.

Trætur kundu tó greiðast á annan hátt enn við dómi, og oftast man fyrst hava ver-

ið roynt við innanhýsis semju. Í bygdum sum í Hesti, har gamla rættarstøðið var varðveitt til seinasta dag, skipanin var í gildi, tykist hetta hava eydnast. Mangastaðni var helst ongantíð neyðugt at koma myndugleikunum uppí.

## Tilvísingar

1. Anton Degn, Oversigt over Fiskeriet og Monopolhandelen paa Færøerne 1709-1856, Thorshavn 1929. Bls. 6.
2. Jens Himmelstrup og Jens Møller (útg.), Danske forfatningslove 1665-1953. København 1958. Bls. 70.
3. Fsnr. 1005/4: Pól á Mýrini, Nólsoy. Líggjas Húsgarð, Varðin, Tórshavn 1939. Bd. 19, bls. 88. Jóan Chr. Poulsen, Hestsøga, Tórshavn 1947. Bls. 164 ff.
4. Anton Degn, Oversigt over fiskeriet... Bls. 7.
5. Jóan Chr. Poulsen, Hestsøga. Bls. 168.
6. Hugtakið 'frammi á plikt' var nýtt um sessin á báti, har avlopsmaður sat, t.d. 9. maður á áttamannafari. Leysur bekkur varð tá settur í frammanfyri toftubekk (fsnr. 529: Jákup F.Z. Johansen í Stórustovu, Sørvági, f. 1900). Navnið bendir á, at avlopsmaðurin ikki bert var tikin við av miskun, men eins nógv av plikt. Jóan Christian Poulsen í Hesti (Hestsøga, s. 168) sigur frá, at tá avlopsmaður var við, fekk hann fullan fiskipart. Fasta manningin fekk tí tað minni.
7. Amtmaður 1862-71.
8. Fsnr. 531: Jóhannes Ferdinand Frederik Heinesen, Sandavágur, f. 1896. Kristian Johan Joensen, Gjógv, f. 1884. Fsnr. 1005/4: Olaf Andreasen, Múla, f. 1900. Líggjas Húsgarð, Varðin 19, bls. 88. Jóan Chr. Poulsen, Hestsøga, bls. 56 f. Fsnr. 506: Jacob Mortensen, Hvalba, f. 1892.
9. Fsnr. 1005/4: Pól á Mýrini, Nólsoy. Upplýsingin um, at fýramannafør ikki vóru undir bátsbandsskipanini, samsvarar við upplýsingina um, at skiftidagar vóru 1. mai og 1. november. Menn vóru bundnir til útróður við stórum báti í vetrarhálvuni og leysir aftur 1. mai, tá fiskiskapurin inni á firðunum eftir sildafiskinum byrjaði við smáum bátum.
10. Anton Degn, Oversigt over fiskeriet... Bls. 6.
11. Rasmus Rasmussen, FF, Blað Føroya fiskimanna, 9. jan. 1925.
12. Fsnr. 371: Kristian J. Joensen, Gjógv, f. 1884.
13. Jóan Chr. Poulsen, Hestsøga. Bls. 164 og 167.
14. Rasmus Rasmussen, FF, 9. jan 1925. Pól A. Pedersen, Um Mikladals bygd, 1956. Bls. 31.
15. Jóan Chr. Poulsen, Hestsøga. Bls. 164.
16. Løgtingsbókin 1666-77, Tórshavn 1961. Bls. 187.
17. J. Símun Hansen, Tey byggja land, bd. I-VII. Klaksvík 1971-1981.
18. J. Símun Hansen, Bd. VI, bls. 154.
19. J. Símun Hansen, Bd. V, bls. 66 ff.
20. J. Símun Hansen, Bd. V, bls. 67.
21. 3 húski eru skrásett í Múla, og tvey teirra høvdu ognarpart í seksmannafari. Triðja húskið var tað hjá Óla Johannesen, bróður Guttorms, ið búði á elsta garðinum. Í fólkateljingini 1801 varð Óli skrásettur undir húskinum hjá bróðrinum, og hóast hann er skrásettur við egnum húski í 1814, finst búnaður hansara ikki í yngri fólkateljingum (sí eisini J. Símun Hansen, Bd. III, bls. 321 ff.). Búnaður hansara má tí metast sum ein partur av garðinum Har Inni.
22. Arne Thorsteinsson, Forn búseting í Føroyum. Fróðskaparrit, 26. bók. Tórshavn 1978. Bls. 54 ff. Sami, Jordforhold i det gamle landbrugssamfund. Landinspektøren, 30. binds 10. hæfte. København 1981. Bls. 664 ff.
23. Fsnr. 506: Jacob Mortensen, Garðsenni, Hvalba. Fsnr. 446: Hans Martin Justinussen, Svínoy. Fsnr. 1005/4: Jógvan A. Sørensen, Mikladal. Jóan Chr. Poulsen, *ibid.*, *bls.* 56.
24. J. Símun Hansen, Bd. III, bls. 3. Anton Degn, Færøske kongsbønder, Tórshavn 1945. Bls. 128 ff.
25. J. Símun Hansen, Bd. I, bls. 118 f.
26. J. Símun Hansen, Havið og vit. Bd. 2, bls. 143 f.
27. J. Símun Hansen, Bd. V, bls. 9.
28. J. Símun Hansen, Bd. II, bls. 110 f.
29. Sí eisini: Jóan Chr. Poulsen, Hestsøga, bls. 168 f.; Anton Degn, Oversigt over fiskeriet ..., bls. 8. Jóan Chr. Poulsen sigur frá, at skjútsskyldan tyktist bygdarfeløgum sínum tyngri at bera enn bátsbandið. Í viðmerkingunum til áðurnevndu fólkatingslóg verður sagt, at skjútsskyldan skuldi ikki verða ávirkað av, at bátsbandsskipanin var tikin av.

Andras Mortensen
Føroya Fornminnasavn
FR-188 Hoyvík
Føroyar